EB/STREYMUR-HB:

# Enn hava gestirnir á Mølini ikki fingið fult

**Men tað hevur heldur ikki gingið nakað serligt hjá heimaliðnum, sum í sjey av níggju royndum á heimavølli bara hevur fingið eitt stig burturúr**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

Meistararnir úr HB vitja longu seinnapartin í dag á Mølini á Eiði. Liðini hava tvær ferðir fyrr í ár dystast. Báðu ferðirnar hevur tað verið í Gundadali, og báðu ferðirnar hevur HB verið greitt omaná. Hóast fínar málmøguleikar, so hevur EB/Streymur ikki megnað at skjóta mál móti HB, sum hevur vunnið 4-0 og 3-0.

Higartil í ár hevur einki mótstøðulið megnað at koppa EB/Streymi á Mølini. Men tað hevur heldur ikki gingið nakað serligt hjá samansetta liðnum at fáa fulla úrtøku á heimavølli. Í níggju landskappingardystum á heimavølli hevur tað tvær ferðir eydnast EB/-Streymi at vunnið. Fyrst vunnu teir 1-0 á KÍ, og so vunnu teir stórsigur 6-1 á VB. Í hinum sjey dystunum er tað endað javnt.



*Hallur Danielsen og HB skulu hava fult í dystinum á Eiði í dag, um teir ætla sær at verða við í stríðnum um meistaraheitið*

EB/Streyma menninir droyma framvegis um fyrstu heiðursmerkini. Um tað skal eydnast at røkka teimum, so hava teir knívin á barkanum hesa ferð. Manningarliga eru teir á heimaliðnum hampuliga væl fyri. Jákup Martin Joensen fer at fáa dystarvenjing á næstbesta liðnum, og Knút Vesturtún, sum seinastu ferðirnar hevur verið stinnur miðvallari í høgru, er ivasamur orsaka av skaða. Arnbjørn Hansen hevur spælt nógv seinastu ferðirnar, men tað verður ikki roknað við, at hann verður tøkur í dag. Mikukvøldið varð hann skaddur í unglingadysti í Runavík.

Hjá HB er tað einki sum eitur. Um teir skulu hugsa um at endurvinna FM heitið, sum teir hava havt patent uppá tríggjar tær seinastu ferðirnar, so mugu teir fáa fult í dag.

Heine Fernandez er tøkur aftur eftir leikbann, og so er spurningurin, hvat HB venjarin ætlar at gera við Una Arge. Sjálvur sigur gamli málrevurin, sum sunnudagin spældi í tjúgu minuttir og eftir bara lítlari løtu skoraði fínt mál, at hann roknar ikki við meiri spælitíð enn henni, sum verður tillutað innskiftara, sum kanska skal hjálpa til.

Verjuleikarin Johannis Joensen fekk skaða í oddadystinum móti B36 fyri trimum vikum síðani, men hann er byrjaður at venja aftur. Í HB rokna teir tó ikki við, at Johannis verður við á Eiði í dag.

Skála-ÍF:

# Skála bíðar framvegis eftir sigrinum

**Tveir av lyklaspælarunum hjá ÍF verða ikki við, tá ið fuglfirðingar í morgin fara at dyrgja eftir triðja javnleikinum móti oddaliðnum**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

ÍF og Skála hava dystast tvær ferðir fyrr í ár. Á Skála endaði hendingaríka oyggjauppgerðin í triðja umfarinum 10. apríl 3-3. Tá var ÍF væl fyri. Í tólvta umfarinum endaði tað 1 Fuglafirði 1-1. Síðani tá er nógv vatn runnið í ánni. Tað hevur ikki hilnast nakað serligt hjá ÌF, sum mest hugsar um at sleppa burtur úr niðurflytingarvandanum, meðan teir á Skála hava havt undanvind. Teir eru oddalið, og higartil hava teir stevnt móti fyrsta meistaraheitinum. Spurningurin er so, um teir fara at fáa gummibein, sum tað plagar at verða tikið til, nú meistaraskapurin nærkast, ella um teir fara at standa seg eins væl, sum teir higartil hava gjørt.

Fuglfirðingar siga seg ikki vera illa nøgdar við leikliga avrikið, tá ið teir á heimavølli sunnudagin taptu móti GÍ. Men í avgerandi løtum vóru teir ikki nóg ansnir, og tað kostaði síðstu løtuna heilt nógv.

Tað er greitt, at miðverjin Poul Ennigarð ikki verður við á Skála. Hann hevur mist fleiri dystir síðani fyrr í summar. Móti GÍ noyddist hann at fara av vøllinum, áðrenn fyrra umfarið var hálvrunnið. Talan er um vøddaskaða frá fyrr í summar, sum nú vitjar aftur. Rúni Elttør hevur fleiri ferðir loyst av í miðverjuni. Hann verður hvørki í miðverjuni ella á vongverjanum í vinstru hesa ferð. Rúni fekk gult kort móti GÍ, og nú er hann leikbannaður.

Sylla noyddist av vøllinum móti GÍ, tí hann var skaddur. Sylla hevur vant í vikuni, og hann verður við í morgin. Tað verður Gunnar Nielsen eisini. Hann hevur vant tvær tær seinastu vikurnar. Síðsta sunnudag spældi hann í 3. deild, og hesa ferð verður hann í besta hópinum. Fritleif í Lambanum kemur heim úr Danmark at hjálpa til, og Bárður á Lakjuni, sum orsaka av skaða ikki var við móti GÍ, hevur aftur verið til venjingar, og tað verður roknað við, at hann verður í hópinum.

Jonn Thomsen hevur vant í nakrar vikur, eftir at hann leingi hevur gingið skaddur. Møguliga verður hann á beinkinum á Skála í morgin.

Skálamenn halda seg ikki kunna annað enn at lata væl at. Onkur smásnuddur hevur verið, men allir spælararnir hava verið til venjingar í hesi vikuni, og hóast teir so at siga hvørja ferð spæla við sama liðnum, so er eitt sindur av kapping um plássini. Í Vági var Arnhold Berg ikki millum teir fyrstu ellivu. Tá varð Rói Jacobsen skiftur inn, og hann skoraði síðsta málið.

Skálamenn siga seg ikki rokna við lættari uppgávu í morgin, men teir staðfesta samstundis, at um teir skulu hugsa um framvegis at vera við í FM stríðnum, so er tað alneyðugt, at teir vinna heimadystirnar.

# Eyðun og Andreas døma í Danmark

**Í hesum døgum er einasta altjóða føroyska dómaraparið í hondbólti, Andreas F. Hansen og Eyðun Samuelsen, í Danmark, har teir skulu døma í eini stórari altjóða hondbóltskapping í Aalborg**

HONDBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Talan er um sonevndu Nøvling Cup kappingina, sum er ein tann størsta kappingin av sínum slag. Kappingin er fyri bæði kvinnur og menn, og menninir eru deildir upp í seks styrkisbólkar, meðan kvinnurnar eru deildar upp í fimm styrkisbólkar.

Nøkur av heimsins sterkastu hondbóltsliðum eru við í kappingini. Nevnast kunnu eitt nú donsku Kolding, Skjern og AaB, norska Haslum og svenska Drott hjá monnum, meðan kvinnukappingin hevur so sterk lið sum Viborg HK, Ikast Bording, Leipzig úr Týsklandi og norska Larvik.

### Døma í Gigantium

Kappingin fór av bakkastokki fríggjadagin, og kappast verður til og við sunnudagin, tá ið seinastu dystirnir verða leiktir. Tá ið vit tosaðu við Eyðun Samuelsen fríggjamorgunin, greiddi hann okkum frá, at teir skulu døma tilsaman sjey dystir. Teir báðir føroysku dómararnir skulu fyrst og fremst døma í tríðbesta bólkinum.

Eyðun greiddi frá, at kappingin er so mikið umfatandi, at kappast verður í fleiri enn tíggju hallum í og uttan fyri Aalborg. Føroyska dómaraparið skal millum annað døma í kendu høllini Gigantium, sum er ein tann størsta og snotuligasta høllin í Danmark, og har sum ein av DM-finalunum hjá kvinnum millum Aalborg DH og Slagelse bleiv spæld farna kappingarár.

### Eisini føroysk lið taka lut

Eyðun Samuelsen og Andreas F. Hansen verða tó ikki einastu føroysku luttakararnir í kappingini. Tey bæði føroysku U21-landsliðini eru eisini við, og tey royna næstniðastu styrkisbólkunum hjá kvinnum og monnum.

Kvinnuunglingarnir eru í bólki saman við norska Avaldsness og donsku liðunum Dall/Ferslev og Rækker Mølle KFUM, meðan mansunglingarnir skulu kappast við trý donsk lið, Bjerringbro FH, HEI Håndbold og Nøvling IF.

# Bæði liðini vilja vinna

**Sunnudagin hittast TB og NSÍ á Sevmýri, og bæði liðini hava harðligani brúk fyri einum sigri**

FORMULADEILDIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tvøramenn liggja aftast á stigatalvuni í Formuladeildini, og um uppflytararnir ikki ætla sær niðar aftur í næstfremstu deildini, ræður tað um hjá teimum nú at tryggja sær nøkur stig. Hesi stig skulu serliga koma á heimavølli, og tí er ógvuliga umráðandi hjá TB at fáa stig burtur úr dystinum móti NSÍ sunnudagin.

### Zivkovic leikbannaður

TB hevur at kalla alt sítt fólk tøkt til dystin móti runavíkingum. Verjuleikarin Predrag Zivkovic fekk gult móti HB seinasta sunnudagin, og hann er tí leikbannaður til dystin móti NSÍ. Harafturat er Bárður Dimon, sum hevur verið á liðnum seinastu vikurnar, farin aftur til Danmarkar, har hann er búsitandi.

Tá ið TB vitjaði í Havn seinasta vikuskifti, var Emanuel Larby ikki við í hópinum, men á Tvøroyri rokna teir við, at hann verður við sunnudagin.

NSÍ hevur eisini tað mesta av sínum fólki tøkt. Framherjin Ike hevur tó framvegis leikbann, men hann verður tøkur aftur næsta vikuskifti. Sjúrður Jacobsen er komin við aftur í hópin, og í vikuni fór Gert Langgaard undir aftur venjingina, eftir at hann hevur verið úti við skaða bróðurpartin av hesum kappingarárinum. Gert verður tó neyvan við í hópinum á Tvøroyri.

NSÍ hevur seinastu tvey umførini bast bæði HB og B36 við Løkin, og teir eru nú av álvara farnir at nærkast oddinum. Um teir av álvara ætla at blanda seg upp í oddastríðið, krevur tað eisini, at teir vinna á TB sunnudagin.